# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TÁ LANDIÐ BÓNDAFANGAR

Einaferð var loysunarorðið privatisering. Landið seldi meirlutan av bankanum, sum varð listaður á børsunum. Sama skuldi gerast við tjóðarflogfelagið, men fyri fyrst bara ein triðing. Her var ein funnin fressur at útvega landinum pengar – hjá einum borgarligum stýri, sum helt seg vera liberalt.

Men nú er vent í holuni. Meðan vakrar ætlanir vóru um privatiseringar, so tykist núverandi vinnumálaráðharri als ongar ætlanir hava – uttan at tileinkisgera ta íløgu, sum privatu eigararnir hava gjørt. Við hesum hevur landskassin fingið eitt rentufrítt lán frá partaeigarunum í Atlantsflogi. Lán frá fólki, sum hava sett pengar í felagið við lyftu um, at meirilutin fór at verða privatiseraður.

Her eru útlendskir íleggjarar, sum veruliga hava brent seg fíggjarliga. Ikki tí at felagið ikki hevur klárað seg, men tí at vinnumálaráðharrin hevur lumpað teir. Hetta er jú tað reina bóndafangarí. Ein útlendingur hevur keypt fyri 15 milliónir krónur í partapeningi í Atlantsflog, og fær als onga ávirkan, og hann hevur als eingi útlit fyri at fáa ávirkan ella at kunna keypa størri part í felagnum – ella fyri tað at selja síni partabrøv, tí vinnupolitikkurin hjá landsstýrinum hevur gjørt tey virðisleys.

Hetta er ein álvarsom støða. Úrslitið av vinnupolitikkinum hjá landsstýrinum er, at privatu partaeigararnir yvirhøvur als onga ávirkan hava. Teir høvdu møguleika at velja ein nevndarlim, men tann rættin hevur landsstýrismaðurin eisini tikið frá teimum.

Føroysku stórpartaeigarar í Atlantsflog eru fyri tað mesta institutionellir stovnar, so sum TF Holding, Lív (hjá landsstýrinum), bankarnir, (partvís hjá landsstýrinum) – og so privata Enniberg, sum tó hevur fingið ein nevndarlim í felagið.

Og so tosa hesi »klóku høvdini« um at gera Føroyar til eitt íløguland, har útlendingar skulu koma við pengum. Tað er tað vallar nakar, sum torir við tí vinnupolitikki, sum landsstýrið rekur – enntá eitt sokallað borgarligt landsstýri.



Eingin útlendingur fer nakrantíð at seta pengar í nakað – ella at stóla upp á nakað, sum eitt slíkt landsstýri ger. Hetta er bara enn eitt dømi um eina fullkomiliga miseydnaða ætlan. Eina ætlan, sum er miseydnað av vánaligum politiskum handverki og vánaligari politiskari ábyrgdarkenslu frá øllum landsstýrinum og løgtinginum við.

Ráðini mugu vera, at landið rindar øllum privatu partaeigarunum í Atlantsflog pengarnar aftur, yvirtekur partabrøvini – og so tað týdningarmesta av øllum, at eingin politikari mukkar eitt orð um privatisering, tí tað er landaskomm so tað forslær.

**» Eingin politikari má nevna orðið privatisering aftur...**

# Helena vísir dirvi



Í gjár boðaði Helena Dam á Neystabø frá, at hon ikki er við í kappingini um at gerast forkvinna í Javnaðarflokkinum. Hon sigur, at starvið sum landsstýriskvinna í mentamálum er sera krevjandi. Hon vísir á nógvu verkætlanirnar, sum hon ynskir at leggja alla sína orku í at føra á mál.

– Tað fer at krevja nógv at røkka teimum málum, sum eg havi sett mær, sigur hon.

Hon vísir eisini á, at tað er hennara vón, at øll lokalfeløg Javnaðarfloksins tosa saman og koma til eina semju um eitt og sama valevni til nýggjan formann í Javnaðarflokkinum.

*Hetta er ein sera skilagóð avgerð hjá Helenu Dam á Neystabø. Tað er einki dulsmál, at hon ikki varð væl móttikin av øllum, tá hon kom aftur í Javnaðarflokkin í 2002. Hon slapp til dømis ikki at stilla upp fyri Suðurstreymoyar Javnaðarfelag.*

*Men hon hevur megnað uppgávuna í Mentamálaráðnum væl. So væl, at hon hevur vunnið nógva virðing aftur millum javnaðarfólk. Við tað at hon ikki roynir eftir formanssessinum, men fer at stuðla tí, sum vald ella valdur verður, vísir hon, at tað ikki bara snýr seg um hennara egna persón.*

*Tað kann fara at líkjast eini farsu, nú so nógv bjóða seg fram – øll frá tí mest kontroversiella politikaranum til tann mest upplagda. Avgerðin um nýggja leiðaran kann tá blíva so tildarlig, at flokkurin verður gjørdur til láturs.*

*Helena Dam á Neystabø er tann fyrsta at vísa dirvi og virðing við ikki at gera valið um hægsta embætið í flokkinum ein eina farsu. Tað vísir ein sterkan politikara.*

# Tobbi ger eitt stunt

Í annaðkvøld fara vit at hoyra Óla Breckmann og Tórbjørn Jacobsen í Hvonn Live á Rás2. Óli Breckmann varð ikki afturvaldur á ting seinast og tykist ikki serliga áhugaður í varatingsessinum, sum hann hevur í løtuni. Tórbjørn Jacobsen hevur boðað frá, at hann stillar ikki upp til næsta val.

Men politiskir eygleiðarar innarliga í Tjóðveldinum siga, at glyvramaðurin kortini stillar uppaftur. Teir siga, at hetta er eitt stunt hjá Tórbjørn Jacobsen, soleiðis at hann stutt fyri valið kann siga, at eftir nógvar áheitanir, so hevur kortini gjørt av at stilla upp. Honum dámar so væl at yvirraska, verður sagt. Hetta frætta vit uttan iva meira um á Rás2 í annaðkvøld.





## » Nýggjur kommunu *deformur*

HEINI HOLM
KJAK Á SÍÐU 11



## » Kommunuskúlin verður býarlund?

EYÐUN Á BORG
KJAK Á SÍÐU 10

# Hvør er skommin Ingeborg?

*– Hetta er stór vanærulig skomm!*

Soleiðis fullu orðini hjá Ingeborg Vinther í sambandi við, at fuglfirðingar ikki ætlaðu sær at akta Føroya Arbeiðarafelag, sum noktaði at landa íslendsk skip, tí verkfall var í Íslandi.

Ingeborg Vinther segði, at *»hetta er ein ræðulig gerð hjá arbeiðarafeløgunum í Fuglafirði og ein stór vanærulig skomm fyri tey«.*

At hetta eru hørð, orð kunnu øll sanna. Onkur lesari hevur tó vent sær til okkara og spurt, hvar hørðu orðini hjá Ingeborg Vinther vóru, tá Føroyar Arbeiðarafelag stuðlaði Føroya Fiskimannafelag við at taka tey mest grundleggjandi fakfelagsrættindini frá Olafi Johansen, sála, tá hann vanæruliga varð sparkaður til hús av órøttum.

*– Tað var ein vanærulig skomm, sum Ingeborg Vinther er átti at átalað. Men tað hevur hon ikki gjørt!*



# Kassadamurnar í Eik fingu skuldina

Nýggju tryggingarmenninir, sum nú ráða fyri borgum í Eik Banka hava rættiliga rætt bakara fyri smið, nú kassadamurnar í Eik máttu rinda prísin og fáa fótin, eftir at teir klóku harrarnir við feitum inntøkum og nógvum partabrøvum koyrdu bankan á heysin.

Er tað virkuliga eingin eftir í bankanum, sum kann ábyrgjast fyri nakað? Vóru tað virkuliga bara Marner og Bjarni, sum høvdu ábyrgdina?

*Teir blivu premieraðir við nøkrum milliónum í part, meðan kassadámurnar fingu fótin í reyvina.*

*Ja ójavnt er býtt...*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*